# Fingu 31 milliónir meira í løn

**Lønarútgjaldingarnar veksa alsamt og tað er serliga hýrur og lønir hjá fiskimonnum sum hækka**

LØNARÚT-GJALDINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað gongur støðugt framá í Føroyum og lønarútgjaldingarnar veksa støðugt. Ein høvuðsorsøk er, at avreiðingarprísurin er hækkaður*

Tað er aftur farið at ganga framá í Føroyum.

Í hvussu so er, um metast skal eftir lønunum, sum verða útgoldnar í Føroyum.

Nýggjasta uppgerð frá Hagstovuni vísir, at í november í ár vóru 31 milliónir hægri enn tær vóru í november í fjør.

Á heimasíðu síni sigur Hagstovan, at í november í ár vóru lønargjaldingarnar 538 milliónir pg tað eru eru 31 milliónir meira enn í november í fjør, tá ið lønarútgjaldingarnar vóru 507 milliónir.

Í prosentum er talan um ein vøkstur upp á 6%.

Tølini vísa, at tað er at kalla í øllum vinnugreinum, at vøkstur hevur verið. Men serliga stórur hevur verið í sambandi við fiskiskap, har lønir og hýrur til sjómenn eru hækkaðar yvir 19 milliónir í november í ár, afturímóti sama mánaði í fjør. Fiskiskapurin er sostatt batnaður frá góðum 66 milliónum í lønarútgjaldinum í november í fjør, til góðar 85 milliónir í november í ár. Talan er um góð 29%.

Men eisini í fiskiídnaðinum á landi hevur verið ein ávís framgongd. Har vóru lønarhækkingarnar 39 milliónir í november í ár og tað er eru 3 milllliónir hægri enn í november í fjør.

Yvirhøvur vísir yvirlitið, at tað er at kalla í øllum vinnugreinum, at lønarútgjaldingarnar eru hækkaðar.

Men summastaðni hevur tó eisini verið talan um afturgongd. Ì prosentum hevur størsta skrædlið verið á ali- og kryvjivirkjunum, men tað er helst ikki óvæntað. Har minkaðu lønarútreiðslurnar úr 6,7 milliónum í november í fjør, niður í 4,5 milliónir í november í ár. Talan er um eina minking upp á næstan 34%.

Hjá gistingarhúsunum og matstovunum eru lønarútgjaldingarnar lækkaðar úr 6,5milliónum, niður í 5,2 milliónir, tað eru góð 20%.

Hagtølini vísa eisini, at verða teir fyrstu 11 mánaðirnar í fjør samanbornir við 11 teir fyrstu mánaðirnar í ár, eru tað bara januar, februar og juli mánaði í ár, sum eru verri enn í fjør, so talan má sigast at vera um eina framgongd sum heild.

**Serliga fiskiskapurin**

Tølini hjá hagstovuni vísa, at tað er heilt síðani á sumri seinasta ár, at tað hevur gingið støðugt framá í fiskiskapinum.

Men tað er ikki tað, at fiskiskapurin er so nógv batnaður. Heldur er tað avreiðingarprísurin, sum er støðugt batnaður og sostatt hækkar eisini avreiðingarvirðið.

– Toskaprísurin er út ímóti tí besta nakrantíð, hýsuprísurin er miðal góður, meðan upsaprísurin flýtur heldur tungt í sjónum.

Hagstovan sigur, at felags fyri prísirnar á hesum trimum fiskasløgunum er kortini, at teir hava verið hækkandi í longri tíð. Toskaprísurin og hýsuprísurin hava verið javnt vaksandi seinastu tvey árini og hetta síðsta árið er eisini upsaprísurin hækkaður.

Enn er tó nakað eftir til prísirnir koma upp á sama støðið, sum fyri nøkrum árum síðani.

Hagstovan hevur eisini gjørt eitt slag av prístali fyri gongdina í prísunum í toski, hýsu og upsa.

Tær útrokningarnar vísa, at fyri tosk, hýsu og upsa, er prístalið vaksið eini 30 prosent síðani árslok 2003 til oktober í ár.

PEUGEOT 806




Keyptur í mai 2001
Prísuppskot 140.000,- v/mvg

Málarameistarin
Uni Zachariasen

Djúpagilsvegur 44 · FO-188 Hoyvík
Tel.: +298 319299 · +298 219299

KØKUR Í SERKLASSA FRÁ INVITA
- det personlige køkken



30% í avsláttri uppá COMET í desember

Sandavágs Timburhandil · á Hillingatanga 6
Fo 360 Sandavágur · tel 332700 · fax 332701 · invita@post.olivant.fo




Glas & List Føroya Termovirki • Sundsvegur 8 • Tórshavn • Tel 350350 • Fax 350351